ALVAL

**SØLUFÓLK**

ALVAL søkir eftir sølufólki.

Av tí, at okkara sølumaður fer undir víðari útbúgving, vilja vit hervið søkja eftir nýggjum sølufólki at byrja uml. 1. apríl.

Vit kunnu bjóða tær eitt fjølbroytt og áhugavert starv innan sølu og tænastu til og av vinnulívinum í Suðuroy.
Tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt, og kann rokna við at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð eisini.
Starvið umfatar eisini útkoyring og vanliga avgreiðslu. Løn eftir avtalu.

ALVAL er ein minni fyritøka í Suðuroy, sum í høvuðsheitum selur sínur vørur og tænastur til vinnulív og stovnar í oynni.

Vit vænta at umsøkjarir hava eina miðnámsútbúgving, so sum HH ella Student, ella at umsøkjarin hevur relevantar royndir á økinum.

Vil tú hava meira at vita, ber til at venda sær til Poul Midjord Dam: poul@alval.fo, tel. 37 21 86 ella 21 21 86.

Umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. marstø 2002.

**ALVAL**
**FO-827 Øravíkarlíð**

# Bilur við stórum skaða til sølu

**Merki:** Saab 900
**Árg.:** 1997
**KM.:** 68.097

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Magni Petersen, sýnsmaður
at hitta:
mánadag – hósdag millum kl. 8⁰⁰–10⁰⁰
fríggjadag millum 8⁰⁰–12⁰⁰ og 13⁰⁰–16⁰⁰

Um hóskandi boð fæst, verður

# Partafelagið ZENITA

lýst til sølu.

Partafelagið rekur tveir ídnaðartrolarar, M/S BERIT S – TG 640 og M/S Zenita – TG 540.

Eisini eigur, og luttekur felagið í øðrum vinnufyritøkum.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tlf: 312238 • fax: 310907
e-mail: sc@atlantic-brokers.com

# Búmerkjakapping

Nú LISA, Listafólkasamband Føroya, verður 20 ár, er avgjørt at skipa fyri búmerkjakapping.

LISA er samskipandi felagsskapurin fyri føroysk listafólk og fyri tær ymisku listagreinirnar so sum sjónleik, tónleik, myndlist og skaldskap. Búmerkið skal tí á einfaldan hátt ímynda tað, sum eyðkennir skapandi listina og/ella felags - skapin listanna millum.

Búmerkið skal kunna nýtast í svart/hvítum prenti. Navni "LISA" og "Council of Faroese Artists" skal kunna setast afturat búmerkinum. Dømi um samanseting av búmerki og navni eru tí vælkomin men eingin beinleiðis treyt.

Uppskotið til búmerki kann vera í støddA4 ella A5, men skal kunna minkast, so tað er hóskiligt at nýta á brævpappíri, á heimasíðu, í teldu og øðrum tílíkum samskifti.

Uppskotið skal bera frámerki, sum skal ganga aftur í afturlatnum brævbjálva saman við navni á innsendara.

Dómsnevnd tekur støðu til innkomnu uppskotini. Í dómsnevndini eru tvey listafólk umframt starvsnevndin.

Ein virðisløn, kr. 15.000, verður latin fyri besta uppskotið. Metir dómsnevndin, at einki hóskandi uppskot er innkomið, skilar hon sær rætt til ikki at lata virðisløn.

Uppskotini skulu verða starvsnevndini í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2002.

Listafólkasamband Føroya
Dj. í Geilsgøta 1
Postrúm 324
FO-110 Tórshavn

Vit sóknast eftir

# Feriuavloysarum til handilin

**Arbeiðstíðirnar eru hesar:**
kl. 06.00 – 13.00
kl. 13.00 – 19.00
kl. 19.00 – 23.30
allar dagar í vikuni

Løn eftir S&K

**Frants Restorff**
Tórsgøta 13
Tlf. 311060
Postmoga 41
110 Tórshavn

frants restorff

# EYKAAÐALFUNDUR

Boðað verður til eykaaðalfundar á Panorama á Hotel Hafnia týsdagin 12. mars 2002, kl. 19³⁰.

**Fundarskráin:** Lógarbroytingar og broytingar av reglugerð fyri Hjálpargrunnin.

**Havnar Handverksmeistarafelag**

O2 T T

**O K TILVØ A NA K O IN AVNVÁG**
**ITA ASSAG LINNA**

stephanssons hús

Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan

*P/F Frants Restorff*

# Vit sóknast eftir fólki til fast starv til handilin

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
kl. 06.00–13.00, kl. 13.00–19.00
kl. 19.00–23.30. Allar dagar í vikuni.

Løn eftir S og K

***Pf. Frants Restorff***
Tórsgøta 13 · Tlf. 311060
Postsmoga 41 · 110 Tórshavn

frants restorff

# Teoriskúlin á Glyvrum

**Nýtt skeið byrjar mánakvøldið kl. 19.00-21.00**

**Johan Beder, tel. 210 821**
**Ole Lykke, tel. 220 972**

Sosialurin - 311820



FØROYA LANDSSTÝRI

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

# Skrivstovufólk

Starv sum skrivstovufólk á Løgmansskrivstovuni er leyst at søkja til setan 1. apríl 2002 ella skjótast gjørligt. Talan er um fast starv. Eisini er talan um at seta ein avloysara í eitt ár í 1/2 tíð.

**Uppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um arbeiði í skjalasavninum (journalini). Talan er um skráseting av posti og ymiskt journal-/arkivarbeiði. Starvið fevnir eisini um at hjálpa til við øðrum uppgávum í Løgmansskrivstovuni.

**Yrkislig førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving. Serligur dentur verður lagdur á royndir við journalarbeiði, kunnleika til DocuLive skipanina og teldukunnleika á brúkarastøði.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og harafturat vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Dentur verður lagdur á røkinskap.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er í fyrsta lagi skjalasavnið á Løgmansskrivstovuni. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna við tilhoyrandi stovnum og aðalstýrini.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sofus Borðoy, journalleiðara ella Petur Simonsen, umsitingarleiðara.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum verða at senda

**Løgmansskrivstovuni**
Tinganesi
FO-100 Tórshavn

Telefon 351010, Telefaks 351015
Teldupostur info@tinganes.fo

og vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi hósdagin 21. mars 2002.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

# SKIPASMIÐJAN




**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25

**P/F Skipasmiðjan á Skála**
Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25

**24 tíma Vakt**
tlf: 21 11 55

. a oe a . o -mail sale a oe a . o

# Dansifrøi



**Avdansiveitslan verður leygardagin 16. mars í Hoydølum**

Borðhaldið byrjar kl. 19.30.
Aftaná verður dansur og høvi verður at dansa teir dansir vit hava lært í vetur

Kostnaður: kr. 150,-

**Seinasta freist at keypa atgongumerki er hósdagin 14. mars í Mótaskálanum, Dr. Jacobsensgøta, ella hjá nevndarlimunum.**

**Við dansikvøðu**

**NEVNDIN**



**HITABLÁSARI**

Sera væl egnaður til frambygdar bátar.
Verður koplað inn í kølivatnið.
Fæst 12 ella 24 volt

D.J. ENNI TVØROYRI

Tlf. 37 10 61

# Virkisleiðari hjá PureWater

**Til virki okkara søkja vit eftir virkisleiðara**

**Starvið**
Sum virkisleiðari fært tú sum partur av leiðslu felagsins, ábyrgd av rakstri og framleiðslu hjá felagnum.

**Høvuðsuppgávur**
- Ábyrgdina av framleiðsluni
- Ábyrgdina í samband við keyp av hjálpirávørum, sum verða nýttar í framleiðsluni
- Ábyrgdina av at seta upp dag-, viku- og mánaðarroknskapir
- At verða við til at skapa eitt trygt og gott arbeiðspláss, har arbeiðsfelagar koma at trívast

**Førleiki**
Vit rokna við, at tú hevur eina útbúgving innan fiskivinnu við møguligum yvirbygningi.

Kunnleiki til framleiðslu av fiskavørum er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Virkisleiðarin er partur av leiðslu felagsins, sum hevur beinleiðis tilvísing til stjóran í felagnum.

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Sp/f PureWater**
Faktorsvegur 6
Postboks 66
700 Klaksvík

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og freistin at lata inn umsókn er 20. mars 2002.

PureWater Seafood

*PureWater er eitt virkið, sum framleiður og selur porsjónir og blokkvørur úr laksi, upsa, hýsu og toski. Tað arbeiða 60 fólk á virkinum.*